# Filipinsk lærarinda á



**“Eg veit, at tað var eitt sindur svakt, men eg angri tað ikki,” sigur Gladys á Kósini um, at hon gifti seg við manni, sum hon næstan bara kendi gjøgnum brøv.**

SAMRØÐA
*Dorit Hansen*
*Dorit@sosialurin.fo*
*Mynd: Høgni Thomsen*

Vit sita inni í hugnaligu og fjálgu stovuni hjá Gladys og føroyska manni hennara. Maðurin siglir við trolara úr Hirtshals. Tvey ára gamli Joshua, sum spælir bil á gólvinum, tosar bæði filipinsk og føroysk orð, meðan hálvt ára gamli Michael bara tosar babymál enn.

## Trygg barnaár

Ikki visti lítla Gladys at hon ein dag skuldi hoyra heima á nøkrum køldum oyggjum í Norðuratlantshavinum. Foreldrini hjá Gladys høvdu níggju børn, fimm døtrar og fýra synir, og fyri at tryggja teimum ein góðan uppvøkstur og góða frammtíð, vórðu tvær av døtrunum fluttar til eldri familju at vera.

Gladys búði hjá ommu síni frá hon var fýra til hon var trettan. Omman búði ikki langt frá foreldrunum, og sum síður er á Filipsoyggjunum var familjan tætt knýtt. Gladys minnist barnaárini sum trygg og stuttlig, omman forkelaði hana, og hon spældi við síni syskinabørn.

> ” *Tá mamma hennara var og vitjaði, var hon kedd um, hvussu hart arbeiði dóttirin hevði. Men tað er ikki so nógv at gera við tað, sigur Gladys.*

Sum 13 ára gomul flutti hon til mostur sína fyri at ganga í studentaskúla.

## Filipinska netverkið

Gladys heldur, at Føroyar líkist Filipsoyggjunum eitt sindur. Klaksvík við sínum brekkum og fjøllum líkist einari filipinskari bygd, og familjusamanhaldið er líka sterkt í báðum londum. Tað búgva eisini nógvir filipinarar í Føroyum, og teir halda líka væl saman, sum føroyingar gera, tá teir eru uttanlands.

Gladys hevur fleiri filipinskar vinkonur í Føroyum, og tær hjálpa og stuðla hvørja aðrari. Tað fer ikki ein føðingardagur framvið, uttan at tær allar eru saman. Mamma Gladys var í Føroyum og hjálpti henni, eftir at fyrsta barnið varð føtt, og nú hevur elsta systir hennara júst verið og hjálpt henni í seks mánaðir. Hetta er filipinskt, sigur hon. Vit hjálpa hvørjum øðrum.

## Lærarastarv

Eftir lokið miðnám las Gladys til lærara á Filipsoyggjunum í fýra ár við sergrein í barnasálarfrøði. Skúlin var dýrur, men foreldrini goldu. Filipinarar seta stóra æru í skúlagongd, og forel-

